# Danir taptu í Spania

Danmark legði bragdliga fyri á Santiago Bernabeu í Madrid. Men tvey tøtt og óneyðug gul kort til Niclas Jensen bóru við sær, at Danmark í meiri enn ein tíma varð undirmannað. Spania dugdi at fáa sær fyrimun av hesi støðuni. Spania skoraði tvær ferðir fyri steðgin, men eftir at danir høvdu minka tíðliga í seinna hálvleiki, trýsti danska liðið og var um reppið at skora aftur.



# Morten Olsen sá reytt

Danski venjarin, Morten Olsen var í øðini inn á dómaran í dystinum millum Spania og Danmark leygardagin. Tað bar at enda við sær, at danski venjarin varð burturvístur. Reyða kortið ber við sær, at Morten Olsen mikukvøldið, tá ið Danmark í Parkini fer at spæla ímóti Svøríki, ikki fer at sita á venjarabeinkinum, men fer at sita millum áskoðararnar.

Svøríki er framvegis oddalið í bólki F. Sviar hava fulla úrtøku - 12 stig eftir fýra dystir. Norðurírland er næstfremst við tíggju stigum, Danmark er á triðja plássi við 7 stigum, og Spania hevur 6 stig. Norðurírland hevur spælt fimm dystir, og Spania og Danmark hava spælt fýra dystir.



*Jákup Mikkelsen hevði fleiri stórbjargingar undan steðginum, men hetta var tó ikki nokk til at steðga Ukraina, sum vann dystin 2-0.*

## FAKTA

**FØROYAR-UKREINA 0-2 (0-1**
*EM undankappingardystur*
Á Svangaskarði leygardagin 24. mars 2007 kl. 15.00
**0-1:** Volodymyr Yezerskyy 21.
**0-2:** Oleg Gusiev 58.
**Dómarakvartett úr Slovenia:** Damir Skomina, Primoz Arhar, Marko Stancin og Peter Sart
**Dómaraeygleiðari úr Danmark:** Kaj Østergaard
**717 áskoðarar**
**Føroyar:** 1. Jákup Mikkelsen, B36, 47/-103 – 4. Atli Danielsen, Frem, 18/0, 7. Fróði Benjaminsen, B36, 41/2, 13. Óli Johannesen, liðformaður, TB, 80/1, 3. Marni Djurhuus, EB/Streymur, 3/0 – 9. Jákup á Borg, HB, 48/2, 8. Mikkjal Thomassen, B36, 3/0 (12. Sámal Joensen, GÍ, 25/0, 78.), 2. Súni Olsen, AaB, 25/1 (15. Tem Hansen, Fremad Amager, 1/0, 74.), 5. Símun Samuelsen, Keflavík, 8/1 (14. Christian Lamhauge Holst, Lyngby, 3/0, 65.) – 6. Rógvi Jacobsen, HB, 41/6, 10. Christian Høgni Jacobsen, HB, 32/2
**Á beinkinum uttan at verða skiftir inn:** 16. Meinhardt Joensen, KÍ, 0/0, 11. Andrew av Fløtum, Fremad Amager, 22/1, 17. Rasmus Nolsøe, HB, 1/0, 18. Mortan úr Hørg, HB, 5/0
**Gult kort:** 4. Atli Danielsen 9.
**Reytt kort:** eingin
**Venjari:** Jógvan Martin Olsen
**Hjálparvenjari:** John Petersen
**Málmansvenjari:** Jens Martin Knudsen
**Lækni:** Tórbjørn Viderø
**Fysioterapeutur:** Álvur Hansen
**Liðleiðari:** Sigurd Hansen
**Ukreina:** 1. Olexandr Shovkovskyi, liðformaður, FC Dynamo Kyiv, 77/0 – 5. Volodymyr Yezerskyy, FC Dnipro Dnipropetrovsk, 29/2, 13. Dmytro Chygrynskyy, FC Shakhtar Donetsk, 2/0, 6. Andriy Rusol, FC Dnipro Dnipropetrovsk, 33/3, 2. Andrii Nesmachniy, FC Dynamo Kyiv, 59/0, – 9. Oleg Gusiev, FC Dynamo Kyiv, 36/3 (16. Andriy Vorobyey, FC Shakhtar Donetsk, 61/8, 60.), 4. Anatoliy Tymoschuk, FC Zenit Russia, 66/1 (8. Oleh Shelaev, FC Dnipro Dnipropetrovsk 29/0, 82.), 17. Taras Mykhalyk, FC Dynamo Kyiv, 3/0,19. Maksym Kalinichenko, Spartak Russia, 29/5 – 20. Olexiy Belik, FC Ahakhtar Donetsk, 19/5, 10. Andriy Voronin, Bayer 04 Leverkusen Týskland, 42/5 (18. Sergiy Nazarenko, FC Dnipro Dnipropetrovsk, 18/3, 74.)
**Á beinkinum uttan at verða skiftir inn:** 23. Andriy Pyatov, 3. Olexandr Kucher, 15. Yegen Levchenko, 22. Vyacheslav Sviderskyy
**Gult kort:** eingin
**Reytt kort:** eingin
**Venjari:** Oleg Blokhin
**Hjálparvenjarar:** Andriy Bal, Scmen Altman, Oleg Kuznetsov
**Fysioterapeutar:** Volodymyr Motrenko og Victor Savin

# Óli er nú komin upp á 80 landsdystir

**Tveir gøtumenn limaðu seg leygardagin inn í 25 felagið, sum nú telur 28 spælarar, og kanska verður víðkað við einum manni afturat í ár. Tað gingu fimm ár frá tí 24. og til 25. landsdystin hjá veterani í Gøtu**

DYSTARTØL
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Liðformaðurin á føroyska landsliðnum setur met hvørja ferð, hann fer á vøllin. Leygardagin var hann fyri 80. ferð á landsliðnum, og hetta var 78. ferðin, at hann taldist millum teir fyrstu ellivu. At talan er um framúr avrik vísa dystartølini hjá spælarum í øðrum londum. Eitt nú eru tað bara níggju danskir spælarar, sum hava rokkið so nógvum dystum, sum Óli hevur spælt.

Næsti avbjóðarin til dystarmetið hjá liðformanninum er Jákup á Borg. Hann er tann av teimum, sum framvegis eru á landsliðnum, ið eigurnæsthægstadystartalið. Tá ið Óli Johannesen mikudagin fer at spæla á landsliðnum fyri 81. ferð, verður dystartalið hjá Jákupi á Borg 49. Næstur Jákupi á Borg er navni hansara, Jákup Mikkelsen, sum mikudagin fer at verja føroyska málið fyri 48. ferð.

Tveir gøtumenn, sum báðir eru miðvallarar, limaðu seg leygardagin inn í felagið fyri fótbóltsspælarar, sum hava umboðað Føroyar í minsta lagi 25 ferðir. Talan er um Súna Olsen, sum var millum teir fyrstu ellivu, og Sámal Joensen, sum var á vøllinum síðsta lítla korterið.

Síðani Føroyar í 1988 fóru at luttaka í UEFA skrásettum landsdystum, eru tað nú 28 føroyingar, sum hava spælt 25 landsdystir. Tað er møguleiki fyri, at ein spælari afturat kann røkka 25 landsdystum í hesum árinum. Talan er um Andrew av Fløtum, sum er skrásettur fyri 22 landsdystir.

Orsakað av skaðum spældi Andrew ongantíð á landsliðnum í fjør. Nú er hann við aftur, men leygardagin var ikki pláss fyri honum á vøllinum.

### Sjáldsama langur steðgur

Tað hevur leingi verið tykist lítið sannlíkt, at Sámal Joensen skuldi røkka 25 landsdystum. Sámal var á landsliðnum fyri 24. ferð 13. februar í 2002 ella fyri fimm árum síðani. Tá var landsliðið á venjingarlegu á Kypros, og í vinardysti ímóti Liktinstein í Paphos, sum Føroyar vunnu 1-0, varð Sámal skiftur inn, tá ið tað restaðu 20 minuttir. Ta ferðina loysti Sámal Joensen Andrew av Fløtum av.

At Sámal eftir fimm ára steðg aftur er á landsliðnum er ikki sørt merkisvert. Í hesi fimm árini hevur Sámal bæði heilt hildið frí frá fótbólti, og so hevur hann eisini verið plágaður av skaðum. Í fjør var hann sannur brandur á GÍ miðvøllinum, og landsliðsúttøkan kann ikki annað enn sigast at vera ógvuliga uppløgd.

Sámal er ein av landsliðsveteranunum, men hann er ikki elsti maður. Jákup Mikkelsen er føddur 16. august í 1970. Óli Johannesen er føddur 6. mai í 1972 og Sámal er triði elstur. Hann hevur føðingardag 15. januar í 1975.

### 102 spælarar í 110 dystum

Ein maður var fyri fyrstu ferð á landsliðnum leygardagin. Talan var um Tem Hansen úr Fremad Amager, sum var á vøllinum síðsta stóra korterið. Hann loysti Súna Olsen av. Tem, sum er føddur 18. januar í 1984, er landsliðsspælari nummar 102. Føroyar hava spælt 110 altjóða skrásettar landsdystir.

Tveir av teimum tjúgu spælarunum, sum vórðu úttiknir til landsdystin ímóti Ukreina, vóru ikki á dómaraseðlinum, har tað bara er pláss fyri átjan nøvnum. Hesir vóru Jón Rói Jacobsen og Hanus Thorleifsson.